Lesið Sosialin -so eru tit við!

ÚTBJÓÐING

## Útbjóðing av lastbilaflutningi í 2005

Flutningur av gróti, skervi og sandi millum bryggjuna á Langasandi og grótbrotið í Hundsarabotni verður við hesum boðin út alment.

Áhugað kunnu venda sær til LV-skrivstovuna, Tinghúsvegi 5, tlf. 311333, har frágreiðing og treytir verður útflýggjað.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

ÚTBJÓÐING

## Útbjóðing av lastbilaflutningi í 2005

Flutningur av forknúsaðum gróti og skervi frá grótbrotinum í Skørðunum og oman á havnalagið í Porkeri verður við hesum boðin út alment.

Áhugað kunnu venda sær til LV-skrivstovuna, Tinghúsvegi 5, tlf. 311333, har frágreiðing og treytir verður útflýggjað.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

ÚTBJÓÐING

## Útbjóðing av lastbilaflutningi í 2005

Flutningur av blandaðum asfalti og skervi úr Hundsarabotni og skevi av Hústoft verður við hesum boðin út alment.

Áhugað kunnu venda sær til LV-skrivstovuna, Tinghúsvegi 5, tlf. 311333, har frágreiðing og treytir verður útflýggjað.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

# Nýtt hotell í Runavík

**Gongur sum ætlað, so verður Sjómansheimið í Runavík latið uppaftur um ein mánað. Men navnið verður broytt**

HOTELLVIRKSEMI
*Snorri Brend*



*Sjómansheimið í Runavík letur nú uppaftur. Byrjanin sær lovandi út, tí longu nú eru fleiri bíleggingar komnar til matstovuna og til kømrini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Avtala er gjørd við hjúnini Andreas og Kirstin Andreasen úr Saltangará um at lata dyrnar upp aftur.

Hetta verður kortini gjørt undir nýggjum navni, tí hereftir skal Sjómansheimið marknaðarføra seg sum »Hotel Runavík Sjómansheimið«.

Tey hava bæði sagt upp arbeiði síni, og koma tískil at arbeiða nógv á hotellinum.

– Skal hetta bera til, er neyðugt at vit arbeiða nógv sjálvi, men tað koma eisini onnur fólk at arbeiða her, sigur Andreas við »Trúboðin«, sum er málgagn hjá Heimamissiónini.

Andreas og Kirstin hava royndir frá slíkum arbeiði, tá tey í trý ár vóru leiðarar á sjómansheiminum í grønlendska býnum Holsteinsborg.

## Fleiri bíleggingar

Sjómansheimið lat aftur í august mánaði í fjør, og hjúnini meta, at nógv má gerast til tess at marknaðarføra hotellið. Tað fer tí eisini at taka nøkur ár, inntil tað veruliga kann hvíla í sær sjálvum.

Tey miða eftir at fáa sín part av ferðafólkunum, ið vitja her, og annars skipa fyri skeiðsdøgum, temadøgum, fyrilestrum og øðrum.

Hjúnini hava langtíðarleigað bygningin, og fara at reka tað við mastovu og kømrum.

Trúboðin skrivar, at í mars mánaði eru longu fleiri stórar bíleggingar komnar til matstovuna. Summarið í ár er somuleiðis longu rættiliga væl selt, og í juni mánað er hotellið næstan fult bílagt.

Í kjallaranum á Hotel Runavík Sjómansheimið fer felagsskapurin Blái Krossur nú at hava virksemið sítt, eins og Formula fer at leiga hin partin av kjallaranum.




Múrurin rapaði, og Berlin gjørdist ein miðdepil í Evropa, har nýhugsan treivst og mentanir møttust. Uppliva býin, har tað rann saman millum eystur og vestur.

**Berlin úr 3.184,-**

Íroknað prísin: Ferðaavgjald, flogferð fram/aftur Føroyar - Keypmannahavn við Atlantic Airways og víðari við Maersk Air, SAS, Icelandair, Finnair, Olympic Airways.

| | | |
|---|---|---|
| Amsterdam | úr | 4.064,- |
| Athen | úr | 3.412,- |
| Bologne | úr | 4.455,- |
| Cairo | úr | 4.113,- |
| Helsinki | úr | 4.145,- |
| London | úr | 3.170,- |
| Madrid | úr | 3.326,- |
| Moskva | úr | 4.730,- |
| Prag | úr | 4.383,- |
| Rom | úr | 3.520,- |
| Skt. Petersburg | úr | 4.679,- |

Bílegging á øllum ferðaskrivstovum og hjá Atlantic Airways.
Talið av ferðaseðlum fyri hesar prísir er avmarkað.

ATLANTIC AIRWAYS
www.atlantic.fo